## Andrias og Dan dystast aftur

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Við seinasta val kom Andrias Petersen á ting í staðin fyri Dan R. Petersen á listanum hjá Javnaðarflokkinum í Eysturoy. Andrias Petersen, lækni, sum hevur verið landsstýrismaður fyri flokkin, fekk bara tríggjar atkvøður fleiri enn Dan R. Petersen, tá ið avtornaði.

Nú val aftur er í hondum, hevur spenningur verið um, hvørt Dan R. Petersen fór at taka dystin uppaftur. Tað er greitt, nú Eysturoyar Javnaðarfelag er liðugt við uppstillingina.

Listin sær soleiðis út: William Max Hansen, Eiði, Sunnleif Højgaard, Runavík, Sylverius Jacobsen, Skáli, Edvin Joensen, Leirvík, Jancy Olsen, Toftir, Andrias Petersen, Gøta, Dan R. Petersen, Fuglafjørður, og Rúni Poulsen, Strendir.

Tilsamans fekk listin 1085 atkvøður seinasta val, og tað gav ein mann á ting. Andrias Petersen fekk 242 atkvøður, Dan R. Petersen fekk 239 atkvøður og Sylverius Jacobsen fekk 214 atkvøður.

## Rúna Sivertsen stillar upp kortini

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Rúna Sivertsen ivaðist í at stilla upp.

Nú Norðoya Fólkafloksfelag er liðugt við uppstillingina til løgtingsvalið 20. januar 2004, er greitt, at Rúna stillar kortini upp.

Listin sær soleiðis út: Petur Hans Joensen, lærari, Anfinn Kallsberg, løgmaður, Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, Jákup Mikkelsen, stjóri, Ólavur Poulsen, skipari, og Rúna Sivertsen, blaðkvinna.

Broytingin frá seinasta løgtingsvali er, at Ólavur Poulsen er nýggjur á listanum, Jógvan Edmund á Geilini og Kristian Fríðrik Olsen stilla ikki upp hesaferð.

Seinast fekk flokkurin 1274 atkvøður og gjørdist størstur. Anfinn Kallsberg fekk 600 atkvøður, Jógvan við Keldu fekk 249 og Jákup Mikkelsen fekk 138. Rúna Sivertsen fekk 96 atkvøður.

## Annlis og Hergeir kappast í Vági

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Annlis Bjarkhamar hevur verið ovast á breddanum síðstu dagarnar. Hennara óvanliga handfaring, tá ið landsantikvarurin skuldi setast, kostaði henni politiska lívið, men nú ger hon eina roynd afturat.

Tjóðveldisflokkurin í Suðuroyar valdømi til løgtingsvalið 20. januar 2004 er liðugur. Listin sær soleiðis út: Poul Erik Jacobsen, stýrimaður úr Sumba, Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, Vági, Annlis Bjarkhamar, lærari, Vági, Johanna í Ólavsstovu, deildarleiðari, Øravík. Dan Nielsen, býráðslimur, Trongisvági, og Ólavur Rasmussen, prestur, Hvalba.

Seinast fekk flokkurin 693 atkvøður. Eingin hótti Hergeir Nielsen, sum fekk 228 atkvøður. Næstur honum var Rúni Nielsen og síðan kom Jógvan Krosslá. Teir báðir síðstu stilla ikki upp hesaferð, men spurningurin er, um Annlis Bjarkhamar er før fyri at bjóða Hergeiri Nielsen av sum fremsti maður floksins í Suðuroy.

## Sambandslistin í Norðstreymoy klárur

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin í Norðstreymoy er eisini liðugur við uppstillingina til komandi løgtingsval. Fýra valevni eru á listanum, harav tvey ikki vóru uppstillað seinast.

Valevnini eru Asbjørn Djurhuus, Olav Enomoto, Karina Fagralón og Bárður Nielsen.

Á seinasta løgtingsvali fekk fekk Sambandsflokkurin 694 atkvøður í Norðstreymoy, sum svarar til 28,7 prosent av atkvøðunum. Tað gav ein mann, sum gjørdist Bárður Nielsen. Hann fekk 196 persónligar atkvøður. Næstur honum var Olav Enomoto, sum fekk 150 atkvøður. Hetta var fyrsta ferð, at Bárður Nielsen kom á ting, og hann gjørdist sostatt partur av nýggja andlitinum hjá Sambandsflokkinum.

# Fulltrúin bíðar enn í óvissuni



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, dregur málið um fulltrúan út til eftir valið. Niels Winther, formaður í BLF, heldur tað vera skilabest at bíða*

**Fulltrúin í Fiskimálaráðnum er framvegis ikki uppsagdur. Líkt er til, at landsstýrismaðurin vil útseta avgerðina til eftir valið, tí talan er um eitt mál, ið gjørdist politiskt. Búskapar- og løgfrøðingafelagið heldur tað vera skilabest at bíða, til nýggjur landsstýrismaður er útnevndur**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Hann er framvegis ikki uppsagdur, hóast hann var sendur til hús fyrst í november mánaði.

Hann situr heima við hús og bíðar, til landsstýrismaðurin ella Fiskimálaráðið finna útav, um hann skal sigast endaliga upp ella koma aftur til arbeiðis.

Tað hevur tikið óvanliga langa tíð at siga nógv umrødda fulltrúan úr starvi. Hann varð sendur til hús, tí løgtingsins umboðsmaðurin átalaði eina handfaring av almennum innliti. Umboðsmaðurin feldi eina lemjandi niðurstøðu av Fiskimálaráðnum 29. oktober og stutt eftir var fulltrúin, sum hevði havt málið um hendi, sendur til hús. Hann hevur kortini rætt til eina hoyring.

Fulltrúin hevur umvegis sítt fakfelag svarað fyri seg, men áðrenn landsstýrismaðurin tók endaliga avgerð, varð val útskrivað. Nú sær út til, at valið fer afturum, áðrenn avgerðin verður tikin, og tað kann bjarga fulltrúanum starvið.

### Útsetir avgerð

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, vil onga avgerð taka, fyrr enn hann hevur fingið vissu fyri, hvørjar heimildir hann hevur á økinum.

– Sum landsstýrismaður í eini starvsstjórn havi eg avmarkaðar heimildir. Hetta uppsagnarmálið gjørdist alment, og tí er tað eisini vorðið politiskt. Eg havi spurt meg fyri hjá løgmansskrivstovuni, hvørjar heimildir eg havi, men eg havi ikki fingið svar enn. Sannlíkindini eru stór fyri, at ein avgerð bíðar til eftir valið, tá ið ein nýggjur landsstýrismaður verður valdur, sigur Jacob Vestergaard.

Samstundis situr fulltrúin heima við hús og bíðar. Spurdur, um tað ikki kann tykjast sum eina órímiliga lang bíðitíð, ásannar Jacob Vestergaard, at tað kann tykjast so.

– Eg skal viðganga, at nógv tíð er gingin, síðan hetta málið tók seg upp. Tað hevur pínt meg, at fulltrúin hevur verið noyddur at bíða so leingi. Men eg noyðist at tryggja mær fyrst, um hvørjar heimildir eg havi, áðrenn eg taki eina avgerð, sigur Jacob Vestergaard.

### Málið

Umboðmaðurin gav Fiskimálaráðnum eina átalu fyri, at álvarsligt brot varð framt á lóggávuna, tá ein blaðmaður søkti um alment innlit. Jacob Vestergaard metti niðurstøðuna at vera »sera álvarsliga«, og kundi hann tí »als ikki góðtaka handfaringina av hesum máli«. Hann segði seg »hava mist álit á saksviðgerðan«, sum tí ikki átti at halda fram.

### BLF bíðar tolið

Búskapar- og løgfrøðingafelagið, sum umboðar fulltrúan, hevur skilt, at tað verður bíðað til eftir valið at taka eina avgerð í málinum. Tað passar teimum fínt.

– Vit halda tað vera natúrligt at bíða til eftir valið. Tað er bert ein starvsstjórn, sum situr, og hon hevur bara heimild at taka alneyðugar avgerðir. Í hesum føri er tað landsstýrismaðurin sjálvur, ið tók avgerðina at senda mannin til hús, og tí hevði tað verið frægast at bíða, til tað er greitt hvør verður landsstýrismaður, áðrenn avgerðin verður endalig, sigur Niels Winther, formaður í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum.

Og meðan jólafriðurin fellur yvir landið við hvítum kavaflykrum, bíðar fulltrúin víðari. Hann veit ikki, um hann er keyptur ella seldur. Hann er framvegis ikki uppsagdur, men hann sleppur ikki til arbeiðis. Hann má bara troysta seg við, at hann fær fulla løn, meðan hann bíðar.



# Finnur vil hjálpa tjóðveldinum

**Heldur óvæntað er Finnur Helmsdal á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi. Tað ljóðaði annars, at hann hevði takkað fyri seg sum landspolitikkari, men hann hevur kortini játtað at stilla upp aftur. Finnur Helmsdal sigur seg vilja hjálpa einum trýstum Tjóðveldisflokki.**



*Finnur Helmsdal er heldur óvæntað á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi. Eftir stríðsmál við Tjóðveldisflokkin seinasta árið, høvdu flest øll væntað, at hann tók seg aftur sum valevni*

*Mynd: Savnsmynd*

UPPSTILLING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevði seinasta uppstillingarfundin fríggjakvøldið. Navnið Finnur Helmsdal høvdu flestøll avskrivað til løgtingsvalið 20. januar. Hann er kortini millum tey 11 nøvnini á tjóðveldislistanum.

Finnur Helmsdal tók í summar ikki av møguleikan at gerast fastur tingmaður, og í vár var hann í opnum stríði við floksfelagan Páll á Reynatúgvu. Hesar hendingar hava havt við sær, at flest øll høvdu ikki roknað við honum til valið 20. januar.

### Hjálp

Á seinasta løgtingsvali fekk Finnur Helmsdal 203 atkvøður í Suðurstreymi. Tað má tí kennast sum ein kærkomin styrkur hjá Tjóðveldisflokkinum, at hann hevur játtað at stilla upp aftur.

– Tað stendur ikki so væl til hjá Tjóðveldisflokkinum í løtuni, og eftir, at eg havi tosað við leiðsluna, havi eg játtað at hjálpa flokkinum. Vónandi kann eg draga nakrar atkvøður til flokkin, og tað er tað, sum er mest týdningarmikið í løtuni, sigur Finnur Helmsdal.

Hann leggur afturat, at persónliga aggið seinasta árið millum seg og Tjóðveldisflokkin-kanska serliga Páll á Reynatúgvu er lagt aftur um – Man er noyddur at verða nóg stórur til at leggja gomul stríðsmál aftur um seg. Nú ræður bert um at arbeiða fyri, at Tjóðveldisflokkurin fær so gott val sum gjørlig, sigur Finnur Helmsdal.

Hann ásannar, at tað útlitini hjá Tjóðveldisflokkinum fyri einum góðum vali eru ikki av teimum bestu í løtuni, og tí má flokkurin spenna seg út komandi vikurnar. – Tað ringasta sum kann henda er, at vit eftir valið fáa ein stóran Sambandsflokk og ein lítlan Tjóðveldisflokk, tí so er framtíðin hjá Føroyum í vanda, greiðir hann frá

### Varatingmaður

Hetta valskeiðið hevur Finnur Helmsdal sitið í tinginum sum varamaður fyri Annitu á Fríðriksmørk, tá hon eitt tíðarskeið var í barsilsfarloyvi.

Í vár tók rumbul seg upp innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum, tá Finnur Helmsdal ikki vildi taka undir við uppskotinum um uppihaldspening, sum landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum Páll á Reynatúgvu ætlaði at leggja fram. Floksfelagarnir Páll og Finnur vóru eftir hendingina í opnum stríði í fjølmiðlunum.

Páll á Reynatúgvu legði uppskotið fram aftur, eftir at Annita á Fríðriksmørk kom í tingið aftur, men orsaka av valinum varð uppskotið ongantíð samtykt.

Í summar stóð tað Finni Helmsdal í boði at gerast fastur tingmaður, eftir at Annita á Fríðríksmørk gjørdist landsstýriskvinna í mentamálum, men av persónligum orsøkum beyð hann sær undan. Grundgevingin var millum, at hann var settur í starv sum stjóri á Føroya Barnaheimi.

### Trý nýggj

Á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymi eru trý nýggj nøvn. Sammett við listan til seinasta val, eru Hildur Patursson, Petur Simonsen og Leivur Hansen farin av, meðan Rúni Nielsen, Tórfríð Johannesen og Niels Uni Dam eru nýggj. Rúni Nielsen hevur áður stillað upp fyri Tjóðveldisflokkin í Suðuroynni, meðan Tórfríð og Niels Uni stilla upp fyri fyrstu ferð.

### Fakta

**Listin hjá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag:**

Annita á Fríðriksmørk
Bjørn Patursson
Finnur Helmsdal
Høgni Hoydal
Jógvan Arge
Kristina Háfoss
Niels Uni Dam
Rói Egholm
Rúni Nielsen
Tórfríð Johannesen
Per Simonsen

